VIÐMERKINGAR

## Heystardagur

Lotið trilkar kølnar
Heystdagur komin í garð
Blóman á bøi urtagarði følna er
Foldin fagra klæðist annan búna
Jarðarurtin í heystar- vetrarsvøvnin fer.

Mannalívið somu lagnu eigur
Frá mansins sáði í kvinnukviðið grør
Sprettur úr móðurlívi kæra barn
Blómar millum móðir faðir vana tú
gævið tær untist fagra fríða lív.

Tó tann dagur altíð koma má
Lívssól tín í vestri standa vil
Tá skal dagur tín væni langi
Í sólarseting mildu lýsa sterkur
Sov so væl til uppreisnardagin ljósa

Rituvík
**Eyðálvur Kári Nielsen**

## Samferðsla um firðir og sund søga

**Hans Jørgensen**



10. desember er søguligur fyrst av øllum Vágafólk fyri, men eisini fagnaðardagur fyri allar føroyingar. Hetta gjørdist dagurin, sum veruliga prógvaði, at oyggjaland okkara í flestu førum kann bindast saman í eina jarðfrøðilga eind, har flest allar farleiðir verða skipaðar í eitt felags samanbundið vegarkervi.

Eg segði í áðni "Fagnaðardagur". Tað er kortini við ymissum kenslum, tú fagnar hesum degi. Vit vita, at við tí stóra framburði og øllum fyrimununum hjá okkum, ið vilja ferðast úr og í Vágar, eru eisini mannalagnur, sum verða settar til viks. Fólk, ið missa arbeiði ella verða fyribils sett at røkja aðrar deyðadømdar rutur nær ella fjar frá tí arbeiðsplássi, tey so trúliga røktu fyri okkum ferðafólk.

Vit mugu ásanna, at fátækt er okkara fólk, tá framburðurin fyri okkum, so harðliga skal raka trúgvastu teknar okkara. Hesar, sum í ringum og góðum líkindum hjúklaðu um okkum umborð á strandfarskipum okkara um landið alt.

Eg fari við hesum at takka manningunum á Sam, Ternuni og á avloysaraskipum teirra fyri framúr góða tænastu. Tit hava uttan undantak víst, at tit vóru uppgávuna vaksin. Eg kendi meg altíð væl umborð hjá tykkum. Ja, kendi meg í mongum førum sum part av "familjuni". Serstakliga kendi eg hetta, tey bæði árini, eg dagliga sigldi um Sundið. Vit plagdu ofta at siga við "stamborðið" fyrsta túr á morgni á veg til Havnar, at tað fór at vera saknur ikki longur at møtast og á ein góðan og positivan kunna byrja dagin í salongini á Ternuni.

Tað kom meira enn so fyri onkuntíð, at einstakir av manningini ikki vóru so morgunfrískir, men kundi nakar krevja tað av teimum, sum lítla og onga náttarhvíld høvdu fingið, tí flúgvarar komu í úrtíð ella onkur vágamaður/kona júst skuldi á sjúkrahús á náttartíð?

Alt hetta er nú bara søga. Men eingin góð framtíð uttan eina góða søgu at minnast aftur á.

Við vón um, at Føroyar vísa tykkum ta virðing og ta tøkk, tit hava uppiborið eftir góða, trúgva og virðiliga tænastu, fari eg enn eina ferð at takka tykkum hjartaliga fyri alt gott. Men eg fari ikki minni hjartaliga at biðja eftir, at tit fáa eina góða og virðiliga viðferð hjá avvarandi myndugleikum, nú samferðslan um Vestmannasund gerst søga.

Vit eru fleiri, ja mong, sum av hjarta ynskja tykkum og familjum tykkara eina bjarta framtíð. Tit gjørdu lív okkara lættari. Takk fyri tað.

## Starvsmannfelagið mótmælir

Til
Løgmansskrivstovan
Tinganes
boks 64
110 Tórshavn

att.: Anfinn Kallsberg,
løgmaður/Ingibjørg Berg,
ráðgevi

Tórshavn t. 27.11.2002



Tykkara mál nr. 240-0008/2002,- skriv dagfest 13.11.2002

Grundleggjandi vilja vit staðfesta, at bestu úrslitini og besta samstarvi millum fakfeløgini og almenna myndugleikan, er beinleiðis treytaður av góðum samskifti, góðari kunning og virðing fyri hvørjum øðrum. Og dømir eru eisini um, at júst slík leið ber frammá.

Tá Løgmaður bjóðaði til fundar 11.11. á Hotel Føroyum, roknaðu vit við, at her fóru stig at verða tikin til, at fáa eitt gott arbeiðslag upp at standa. Men ørkymlandi var beinanvegin, at í innbjóðingini til fundin - 04.11. - , vóru mál tikin fram, sum beinleiðis eru sáttmálabundin (eftirløn, útbúgvingarskipanir t.d.) og onnur, sum liggja í øðrum ráðum til avgreiðslu (barsilskipanin, LÍV t.d.).

À fundinum 11.11. fingu vit tó nøkur upplýsandi og góð innlegg/frágreiðingar frá væl fyrireikaðum fakfólkum um nøkur grundleggjandi viðurskiftir í samfelag okkara - skattur og eftirløn, men tó skal leggjast afturat, at hetta at draga so nógv fólk í arbeiðstíðini at fáa innlegg um viðurskiftir, ið fyri hesi fólk eiga at verða sjálvfylgja, er nærum at misbrúka løgmansembæti.

Men beint áðrenn fundurin endaði og lítið av tíð var eftir, varð lagt fram ein ætlan um at skipa ein verkætlanarbólk, sum skuldi telja 10 fólk, - har 3 umboð frá fakfeløgum skuldi seta seg saman við 3 umboðum frá arbeiðsgevarum, og einum umboði úr ávikavist Løgmansskrivstovuni (formaður), Almannaráðnum, Vinnumálaráðnum og Fíggjarmálaráðnum.

Tað er onki at taka seg aftur í, at flestu luttakararnir kendu seg at verða tiknan á bóli, tí her varð løgd fram eina ætlan, sum greitt vísti, at løgmaður ikki hevði megna at fáa politiska baklandið hjá sær uppá pláss, og nú royndi at skumpa óloystar samgonguspurningar yvir á ætlaða verkætlanarbólkin. Vit kunnu taka sum dømi eftirlønarspurningin, sum seinastu fimm árini hevur renka millum ein, tveir, og tríggjar landsstýrismenn og nú er aftur á blonkum pappíri hjá løgmanni (á aðrari síðuni) og málið um LÍV, sum hevur eina greiða løgtingsamtykt at halda seg til og sum løgmaður á ólavsøku boðaði frá, skuldi setast í verk beinavegin. Her hongur ikki saman.

Var ætlanin við fundinum at luttakararnir skuldu fáa ein ábending um, hvat løgmaður veruliga ætlaði við hesum tiltakið, skuldi kunningin um hetta verið send út í góðari tíð frammanundan og tíð skuldi verið avsett á fundinum til at skifta orð um hetta og uttan iva høvdu flestu longu tá kunna lagt sína støðu fram til hesa ætlan løgmanns. Men her varð alt skunda ígjøgnum og vit føldu okkum at sita eftir á berum.

Í skrivinum 13.11. verður roynt at taka samanum ætlanina, sum varð "løgd fram" á fundinum 11.11., men torført er at finna eina greiða leið ella greiðan leist í hesi ætlan, men harafturímóti helst ein staðfesting av, at løgmaður hevur tikið mál til sín, sum sambært verandi byggnað liggja beinleiðis undir øðrum ráðnum.

Tað sær eisini út sum, at løgmaður hevur misfata sína uppgávu, tí,- hvørjar heimildir hevur løgmaður, at draga mál, ið hoyra heima hjá øðrum pørtum á arbeiðsmarknaðinum undir seg. Okkara svar er, at løgmaður skal seg burtur frá hesum.

Soleiðis sum almenni bygnaðurin í dag er uppbygdur, er okkara adressa bert á einum staðið,- Fíggjarmálaráðnum, meðan onki avgerðarsamstarv kann fara fram mótvegis øðrum ráðum, - her slepst ikki tvørturum mark !

Ein trupuleiki hjá okkum hevur tó allatíðina verið, at starvsfólkamál liggja í tveimum ráðum,- sáttmálaparturin í Fíggjarmálaráðnum og starvsfólkamál hjá løgmanni. Hesi mál hoyra sjálvsagt nattúrliga saman, men vit mugu ásannað, at í fleiri førum, tá starvsfólkamál eru endaði á løgmansskrivstovuni, so er ongin avgerðarmyndugleiki her, men bert leysar orðingar, eins og sigast má um tann higartil orðað starvsfólkapolitikkin frá løgmansskrivstovuni,- leiðbeinandi orðingar, uttan nakran avgerðarmyndugleika tá á stendur.

Vit hava fleiri víst á tað óheppna í hesum og hava mælt til, at sáttmálaviðurskiftir og starvsfólkamál eiga og mugu liggja undir einum "hatti". Hetta verður tí eisini eitt av høvuðsmálunum, ið vit vilja hava loyst, nú nýggjar sáttmálasamráðingar standa fyri durum.

Vit fara tí at mótmæla og átala, at løgmaður nú helst ætlar at ganga mótsatta vegin og draga mál til sín, sum undir ongum umstøðum hoyra heima har. "Vit standa spyrjandi", sum politikarar eru vanir at málbera seg.

Tað er eisini fyri okkum fullkomuliga ógreitt hvat beinleiðis ætlanin er við einum slíkum verkætlanarbólki á núverandi støði,- hvat er hugsanin við einum "arbeiðssettingi íroknað raðfesting av evnisøkjum og tíðarætlan, at leggja fyri politiska støðutakan", hvønn myndugleika skal bólkurin hava, um bólkurin verður samdur ella um hann ikki verður samdur, hvørjar verða avleiðingingar av hesum, vil hetta ávirka verandi sáttmálaásetingarnar, hvør skal skera ígjøgnum og hvussu við spurninginum "at seta smærri bólkar av umboðum og serfrøðingum at viðgera ymisku evnisøkini, at fylgja upp og hava eftirlit við arbeiðnum, at góðkenna uppskot frá smærri bólkunum og leggja fyri politiska myndugleikan til støðutakan ", skal bólkurin (ella bólkarnir) hava politiskan leiklut ella ??

Her eru so ógreiðar og fløkjasligar ætlanir, at tað als ikki ber til at taka støðu til hetta á núverandi støði, og harafturat er alt sum bendir á, at tey blonku ørkini hóast alt ikki eru blonk á báðum síðum, tí vit fáa ikki annað burturúr hesum, enn at hetta tiltak í fyrsta umfari er eitt "jarnbrot" til at loysa innanhýsis samgongutrupulleikar og tann spurningin fara vit undir ongum umstøðum út í.

Taka vit so ætlanin við bólkasamsetingini, so skal hesin telja tíggju fólk, harav løntakarasíðan skal manna trý av hesum,- hvørji skulu hesi vera, frá hvørjum feløgum, hvør skal taka stig til at velja tey? Vit vita, at fakfeløg hava ymsar ásetingar á nógvum økjum, t.d. á eftirlønar- og tyggingarøkinum,- nøkur hava góðar avtalur onnur eru í byrjan,- hví skulu so ikki øll sjónarmiðini hjá feløgunum umboðast, tá arbeiðsgevarasíðan (almenna og privata) frammanundan hevur avgerðandi leiklut. Her hongur ikki saman og kemur ikki uppá tal, at vit (fakfeløg) kunnu fara inn í slíkt ódefinerað arbeiði.

Niðurstøða okkara er tí, at vit fara ikki inní hetta arbeiði,- tað krevur eina nógv greiðari og betri upplýsing, hvat veruliga ætlanin er við einum slíkum tiltaki, áðrenn vit kunnu viðgera hetta í álvara og fara vit eisini at ávara ímóti, at vit verða gjørd til "kastibløkur" fyri at fáa innanhýsis samgongupolitiskar kabalur at ganga upp. Harafturímóti fara vit at heita á løgmann at nýta orkuna á hesum øki, at skipa øll starvsfólkaviðurskiftir betur, við at leggja alt sum hevur við starvsfólkaviðurskiftir at gera undir eina leiðslu, har veruligur myndugleiki er tilstaðar.

At enda skulu vit gera vart við og endurtaka, at umráðandi er við góðum og uppbyggjandi samstarvi millum partarnar á arbeiðsmarknaðinum, ongin ivi um tað, - bert spell, at fyrsta stigið frá løgmansskrivstovuni ikki legði upp til eitt meira greitt og seriøst endamál og kunnu vit ikki taka endaliga støðu til slíkt virksemi, fyrrenn tað er greitt, hvørja hugsan, ætlan og endamál tit hava sett tykkum fyri við hesum.

f.v.
**Gunnleivur Dalsgarð,**
**formaður**



# Løgmaður á fleyg



*Løgmaður er øgiliga spentur. Hann væntar eina stóra kanón*



*Nú hevur han eina hylling á, hvat hetta er. Men gevararnir hava ikki grunað, hvat hann sjálvur ætlar at brúka gávuna til*

**Til at heiðra løgmann, sum fylti 55 ár herfyri, hevði Fólkflokkurin lítla samkomu í flokshølunum á Gamla Apoteki. Sum siður er, fekk føðingardagsbarnið eisini eina gávu**

FØÐINGARDAGUR
*Myndir: Fólkaflokkurin*

Floksfelagar løgmans hildu, at hann skuldi fáa eina føðingardagsgávu, sum hann hevði brúk fyri. So teir valdu eitt gamalt, føroyskt veiðiamboð.



*Jørgen og Keldu-Jógvan sýnast ovfarnir, meðan Løðu-Jógvan blandar seg uppí*



*So vísir løgmaður, hvussu ein fleygingastong verður brúkt, samstundis sum hann avdúkar, hvat hann í veruleikanum ætlar at brúka hana til. Hon skal nevniliga ikki brúkast til lundar á Viðareði í fyrsta umfari, men til at taka óstýriligar samgongumenn, helst tjóðveldismenn á flogi, við. Og tað heldur Jógvan við Keldu vera eitt gott hugskot.*

## Fara at svimja um Vetmannasund

**Í samband við, at Vágatunnilin letur upp, verður skipað fyri svimjing um Vestmannasund sunnudagin 8. december**

Á BLOTAN
*Edvard Joensen*

Ætlandi verður skipað fyri svimjing um Vestmannasund sunnudagin 8. december. Svomið verður av Streymoynni, og málið er við ferjuleguna við Oyrargjógv.

Ein av fyrireikarunum, Erlendur Simonsen, sigur, at vestfalskyrrindi eru í Vestmanasundi klokkan tíggju minuttir í tólv sunnudagin, og ætlanin er at leggja frá landi klokkan hálgum tólv.

Farið verður úr Vestmanna við báti nakað fyrr, og siglt verður suður um Egilsnes, har fyrst verður farið upp á land og síðan lopið aftru í havið og svomið yvirum.

Erlendur er vanur at skipa fyri slíkum túrur. Hann plagar at standa fyri svimjing um Nólsoyarfjørð. Tó veit hann ikki nágreiniliga, hvussu leingi roknast kann við, at ein túrur um Vestmannasund tekur, men hann er nógv styttri enn túrurin til Nólsoyar.

Komast kann á land í Vágum, har ein nú kemur at landi, og so verður runnið á Oyrargjógv, har sjálvt málið er.

Nærri verður lýst um svimjingina í komandi blaði.

Tey, sum ætla at luttaka, skulu tekna seg á teldupostadressuni hjá Erlendi Simonsen sum skjótast. Adressan er: erlendur@post.olivant.fo